# Musikkskúla-skipanin

Til skúlaárið 2006/2007 verður søkt eftir lærarum at undirvísa í:
- rytmiskum sangi
- rytmiskum klaveri
- klassiskum slagverki
- klassiskum klaveri
- klassiskum sangi
- urgu/kirkjuurgu
- kontrabassi

**Somuleiðis verður søkt eftir:**
- lærara við almennari tónleikaútbúgving
- lærara við útbúgving í rytmiskum tónleiki

**Leysir tímar at søkja:**
- í musikkspælistovu/rytmikki, blokkfloytu, tvørfloytu, obo, klarinett, saxofon, violin, cello, klaveri, messingljóðføri, valdhorni, gittara, elgittara, elbassi, trummum, harmoniku/accordeon, teori/rytmiskari teori, hoyrilæru, improvisatión, klaverfylgispæli, kórleiðslu og ensemble-leiðslu.

**Førleikakrav:** Lokið prógv frá musikkkonservatorium ella útbúgving á sama stigi.

Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Figgjarmálaráðið og Musikklærarafelagið.

**Umsóknarfreist:** 3. juli 2006 kl. 12.00.

Um størv og undirvísingarstøð fæst nærri at vita hjá Martini Mouritsen, leiðara.

Umsókn við prógvi, starvsroyndum og viðkomandi skjølum skal sendast til

**Musikkskúlaskipanin**
Hoyvíksvegur 72
FO-100 Tórshavn
Tlf. 316462 · fartlf. 216462 · fax 316991
Teldupostur: martin@mmr.fo
www.musikkskulin.fo

# Bygging av raðhúsum við Bólstein

Í sambandi við útstykking við Bólstein í Leirvík, hevur kommunan lagt tvey stykkir út til raðhús.

Víddin á hvørjum stykki er 1.420 $m^2$ . Kostnaðurin fyri lendið er kr. 150,00 pr. m2.

Kommunan hevur gjørt veg til stykkini og installatiónir eru lagdar inn á stykkini.

Ætlanin er at byggja raðhús á stykkini, sum skulu fella væl inn í lendið. Byggingin skal tó lúka ásetingar í verandi byggisamtykt fyri Leirvíkar kommunu.

Við tilboðnum skal fylgja skitsuuppskot til bygging.

Byggingin skal byrja í seinasta lagi ½ ár eftir projektgóðkenning og verða liðug sambært ásettari tíðarfreist.

Keyparin skal binda seg til at selja lidnu húsini víðari til tann prísin, ið tilboðið til kommununa er grundað á.

Áðrenn møguligur sáttmáli verður undirskrivaður, skal fyriliggja váttan frá peningastovni um fígging.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð ella einki at velja.

Nærri kunning um byggiætlanina og útbjóðingartilfar kann fáast við at venda sær til Leirvíkar Kommunu tlf. 443 006.

Stykkini vera við hesum boðin út til bygging.

Boð saman við uppskoti um bygging skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 14. august 2006.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
Kulibakki 15
520 Leirvík

# Endurlýsing

## av deildarleiðarastarvi á Familjudeildini á Føroya Barnaheimi

Vegna ov fáar umsóknir, verður deildarleiðarastarvið á Familjudeildini endurlýst. Starvið verður leyst til setan frá 1. oktober 2006 ella skjótast tilber.

**Um Familjudeildina:**
Á Familjudeildini arbeiða 7 starvsfólk í einum tvørfakligum toymi, øll við viðkomandi útbúgving.

Endamálið við arbeiðnum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og hvørjar trupuleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvør stuðul er best og mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Førleikakrøv til deildarleiðarastarvið:**
Vit sóknast eftir einum dugnaligum deildarleiðara, ið hevur royndir við familjuarbeiði og sum somuleiðis hevur leiðsluroyndir. Tað er umráðandi, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni og er til reiðar at ganga fremst í tí fakliga arbeiðnum á deildini. Harumframt hevur deildarleiðarin ábyrgdina av og skipar samskiftið við barnaverndartænastur, Almannastovuna, heilsusystrar, læknar, sálarfrøðingar, sosialráðgevarar, barnagarðar, skúlar, sjúkrahús, viðgerðarstovnar o.s.fr.

Á Familjudeildini verður í løtini arbeitt við at víðka og broyta virksemið á Familjudeildini og skal deildarleiðarin somuleiðis standa á odda fyri hesum arbeiði.

**Útbúgving:**
Hóskandi útbúgving krevst.

**Løn:**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 4. august 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Beintu Johannesen, leiðara á tlf. 312320

**Føroya Barnaheim**
Pedda vid Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn




Søkt verður eftir **klinikkassistenti** at byrja 14. august 2006.

Umsókn við avriti av møguligum prógvi og viðmælum skal sendast Tannlæknastovuni áðrenn 5. juli 2006.

**Tannlæknastovan hjá Steintór Larsen**
Torkilskrókur 8 · FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444358 · stein@online.fo · fax 444602



# Pakkifólk

Søkt verður eftir røskum pakkifólki til pakkadeild okkara, at arbeiða aðru hvørja viku.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja ella støkka inn á gólvið og spyrja eftir Bent.

**Hjá Gunleivi**
c/o P/f Vørður
Hoyvíksvegur 65 · postboks 1048
Tel 23 62 11 ella 31 21 61



# Kondittari

Søkt verður eftir kondittara at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag frá kl. 07.00 - 15.00 og uml. 3 hvørt vikuskiftið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen

**Bakaríið Hjá Gunleivi**
c/o P/f Vørður
Hoyvíksvegur 65 · postboks 1048
Tel 23 62 11 ella 31 21 61